# Allir leyslatnir



Løgreglan í Liverpool leyslat teir seks tannnáringarnar, sum vóru fongslaðir í sambandi við morðið á 11-ára gamla Rhys Jones. Ákærurnar móti fýra av teimum seks vórðu sleptar, meðan hinir báðir vóru latnir leysir móti loysigjaldi. Teir báðir eru framvegis mistonktir, og eru ávikavist 16 og 19 ára gamlir. Harvið er eingin í fongsli í málinum, sum hevur skakað alt Ongland. Tann 11-ára gamli varð skotin, tá hann spældi fótbólt á einum parkeringsøki stutt frá heimi sínum.

# Íløgur í Afrika

Afrika og menningarlond í Miðeystri og Asia er seinasta skríggj hjá altjóða íleggjarum. New Frontier verða økini nevnd, sum minna um nýggju marknaðirnar fyri tíggju árum síðani. Men talan er ikki bert um eina snilda »mótadillu«. Fleiri av størstu kapitalumsitarum í London eru byrjaðir at gera íløgur á eksotiskum marknaðum so sum Filabeinstrondini, Nigeria, Kenya og Kazakhstan, skrivar danska blaðið Børsen.

# Trygdin á Summarfestivalinum var í lagi

**Tað hevur verið ført fram í fjølmiðlunum seinastu tíðina, at eingin trygdarskipan var á Summarfestivalinum. Arvid Nilssen, varapolitikommiserur, verður endurgivin fyri at siga, at eingin skrivlig tilbúgving var, men kortini váttar hann sjálvur í skrivi, at trygdin var góðkend**

TILBÚGVING
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Dimmalætting hevur í fleiri umførum lagt eftir trygdini á Summarfestivalinum, og hevur í hesum sambandi tosað við fleiri fólk, ið vóru tengd at festivalinum, antin sum vaktir, barrvørar ella á annan hátt.

Samlaða myndin av hesum er greitt hon, at trygdin var rættiliga ivasom.

Eisini hevur blaðið tosað við Arvid Nilssen, varapolitikommiser, og hesin váttar, at eingin skrivlig trygdarætlan fyrilá.

Men hetta er ikki rætt, tí í skrivi dagfest 6. august (mánadagin eftir festivalvikuskiftið), váttar Arvid Nilssen, at fleiri fundir høvdu verið millum løgregluna, trygdarumboð fyri Summarfestivalin, Birgir W. Høgnesen, og Finn Hansen, sløkkiliðsleiðara.

»Vit gingu alt økið ígjøgnum og settu ávís krøv, sum vórðu fylgd«, stendur orðarætt í hesi váttanini frá Politistøðini í Klaksvík.

Somuleiðis váttar Klaksvíkar Kommuna í einari eftirmeting, at almenna trygdin var í lagi á festivalinum.

»Vit høvdu nakrar viðmerkingar viðvíkjandi rýmingarleiðum, gassfløskum, eldsløkkjarum o.a., sum vóru rættaðar beinanvegin. Annars høvdu vit einki at viðmerkja til almennu trygdina á økinum sum heild«

## Alt var góðkent

Greinin í Dimmalætting fríggjadagin 24. august hevur eisini hug at benda veruleikan nakað. Undir yvirskriftini »Onga skrivliga tilbúgvingarætlan« verður róð uppundir, at eingin trygdarætlan var, men í greinini váttar Arvid Nilssen, at tilbúgvingarætlan fyri festivalin 2006 var til skjals, og at bygt varð víðari á hesa ætlan.

Hetta hevur varapolitikommiserurin eisini váttað yvirfyri Sosialinum.

Eisini váttar Arvid Nilssen, at trygdin eftir teirra meting var í lagi, men at ógvuliga vánaliga veðrið gjørdi, at okkurt helst kundi verið gjørt øðrvísi.

Men eftir stendur, at bæði løgreglan og brunaumsjónin hjá Klaksvíkar Kommunu í eftirmeting vátta, at trygdin var í lagi, og at allar viðmerkingar, hesir báðir instansir høvdu, beinanvegin vóru gingnar á møti.

So viðkomandi myndugleikar høvdu góðkent trygdarviðurskiftini undan festivalinum, og hava eisini váttað hetta í eftirmetingum sínum.

Tað er heldur ikki rætt tá ført verður fram, at ongar leiðreglur finnast fyri tílík tiltøk sum Summarfestivalin. Brunaumsjón Landsins hevur slíkar reglur, sum eitt loyvi verður grundað á. Hendan reglugerð stavar frá september mánaði 2004, er dagførd í september 2006 og rættað í januar 2007.

Fyrireikararnir av Summarfestivalinum hava valt at flýggja fjølmiðlunum skjøl sum vísa, at trygdin var í lagi og góðkend av viðkomandi myndugleikum.





*Hesi bæði skjølini prógva, at trygdin á Summarfestivalinum var í lagi og góðkend av viðkomandi myndugleikum*

# Ávirkar ikki upp á stutt sikt

**Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, metti ikki, at gjaldsmynstrið ávirkar landskassan upp á stutt sikt, men upp á longri sikt kann tað eyðvitað ávirka**

GJALDSMYNSTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Temadagurin, sum Intrum Justitia skipaði fyri á Hotel Hafnia fríggjadagin, bjóðaði nógv áhugaverd íkast frá ymsum síðum. Fyrstur at fáa orðið var Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri, sum greiddi frá, hvussu hann metti, at gjaldføriðella gjaldsmynstrið hjá føroyingum ávirkar samfelagsbúskapin.

Hesin temadagurin var serliga fyriskipaður í sambandi við at eitt gjaldsindex fyri Føroyar nú er gjørt. Hetta vísir, at føroyingar ikki eru so ógvuliga raskir at gjalda til tíðina, og tí kundi verið áhugavert at vita, um hetta ávirkar samlaða samfelagsbúskapin.

Magni Laksáfoss vísti á, at tá fólk ikki gjalda til tíðina, versnar hetta sjálvandi um gjaldføri hjá fyritøkuni, og hetta ávirkar so aftur møguleikarnar hjá fyritøkuni at menna seg.

- Stórar og peningasterkar fyritøkur hava sjálvandi munandi betri møguleika at standa ímóti, so tað eru tær nýggju og smærru fyritøkurnar, sum merkja sviðan av seint goldnu rokningunum, segði Magni Laksáfoss.

## Kappingarføri

Fíggjarmálaráðharrin vísti á, at tað ofta var hjá nýggjum, dynamiskum fyritøkum, at gjaldsmynstrið við seint goldnum rokningum setti síni spor.

Serliga nýggjar entreprenørfyritøkur eru sárbarar mótvegis hesum.

- Alt annað líka, mugu hesar fyritøkur fáa peningin til vega aðrastaðni frá, sum teir ikki fáa frá skuldarum sínum. Hetta rakar í serligan mun nýggjar fyritøkur; tær gomlu og etableraðu kenna marknaðin og vita, hvør er góður gjaldari og hvør ikki er, segði Magni Laksáfoss.

Hann segði, at samlað sæð geva ov seint goldnar rokningar verri gjaldsevni hjá fyritøkunum. Men hetta er ikki nakað, sum upp á stutt sikt ávirkar landskassan.

- Vit liva av einum dynamikki í vinnuni, liva av, at kappingarførið hjá vinnuni er gott. Og tað hevur gjaldsmynstrið stóra ávirkan á, segði Magni Laksáfoss, fíggjarmálaráðharri.



*Magni Laksáfoss var hin fyrsti, sum fekk orðið á temadegnum á Hotel Hafnia, sum Intrum Justitia skipaði fyri*

*Mynd: Leo Poulsen*